K600-2008043-3

Kappingarráðið

AVRIT

**Advokatfelagið** við Strond 4 Í/F
Yviri við Strond 4
Boks 359
110 Tórshavn

Tórshavn, 10. september 2008

J.nr.: K600-2008043-3
Viðgjørt: LO
Tygara ref: 2350802

Att.: Mimi Steintórsdóttir, adv.ft.

**Viðvíkjandi samanleggin millum Alpha Travel Sp/f og Sp/f Fonnco**
Í skrivi dagfest tann 4. september 2008 boða tygum frá, at Alpha Travel Sp/f hevur yvirtikið Sp/f Fonnco.

Talan er um samanlegging sambært Kappingarlógini § 13, tí fyritøkurnar, sum hava virkað sjálvstøðugar, verðar lagdar saman.

Av tí at luttakandi fyritøkurnar sambært fráboðanini hvør sær hava ein ársumseting, ið er omanfyri 4 mió. kr, skal samanleggingin fráboðast Kappingareftirlitinum við atliti at, um samanleggingin hevur nakra ávirkan á kappingina á ávísa marknaðinum, sbr. § 14.

**Avgerð**
Mett verður, at samanleggingin ikki ávirkar kappingina á ávísa marknaðinum, og tí skal sambært § 14, stk. 2, nr. 1 í Kappingarlógini verða váttað, at fráboðanin er móttikin og verður ikki viðgjørd sambært § 14, stk. 1, nr. 2 og 3.

Virksemið hjá samanløgdu fyritøkunum er í høvuðsheitum søla av ferðaseðlum um allan heim. Sostatt er viðkomandi marknaðurin landafrøðiliga ikki einans føroyski marknaðurin. Tað eru 5 føroyskar fyritøkur á marknaðinum. Atgongdin til marknaðin er góð millum annað tí, at tað krevst ikki nógvan kapital til byrjunaríløgu og kunnleika til serliga tekniska vitan (know-how).

Samlaði marknaðarparturin hjá luttakandi fyritøkunum liggur um tey 20 %. Í kappingarrættarligum høpi verður vanliga sagt, at ein øking í marknaðarpartinum til eitt nú 25 % ikki verður mett at hindra kappingini. Í so fall skulu tað vera serlig viðurskifti, ið gera, at kappingin á marknaðinum verður forðað. Í hesum føri er ikki talan um tílík viðurskifti.

Við støði í hesum viðurskiftum verður mett, at samanleggingin hevur ikki ávirkan á kappingin á ávísa marknaðinum, ið fyritøkurnar virka á, og verður tí ikki nágreiniligari viðgjørd.

Tessvegna er avgjørt at vátta, at fráboðanin um samanleggingina er móttøkin, og at kappingarmyndugleikin hevur onga viðmerking til hana.

Vegna Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

/Leif Olsen
fulltrúi

Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo